**8. flokkur, Skúlin við Løgmannabreyt**
**Maria Beder**
**Kristina Verlandsdóttir Hayfield**
**Ida í Lon**
**ungdómstinglimir**

Ungdómstingið

**Ungdómstingmál nr. 1/2020: Uppskot til samtyktar um at banna innflutningi av ikki ES-góðkendum vørum**

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Ungdómstingið heitir á landsstýrið um at fyrireika og leggja fram lógaruppskot, soleiðis at innflutningur av ikki ES-góðkendum vørum verður bannaður.

**Viðmerkingar**
Vit heita á landsstýrið um at banna innflutningi av ikki ES góðkendum vørum til Føroya, millum annað frá útlendskum heimasíðum so sum Wish, eBay og aliexpress. Tað hevur verið ein kanning, har tey høvdu kannað 12 leikur til børn frá heimasíðuni Wish. Kanningin vísti, at allar 12 leikurnar høvdu eitrandi evni í sær, og tær vóru ikki ES góðkendar.

Vit halda ikki, at tað gevur meining at innflyta vørur, sum hava eitrandi evni í sær, ið ikki eru ES góðkendar, tá vit eru ein partur av Danmark, og Danmark er limur í ES. Vit halda heldur ikki, at tað er rætt at bjóða borgarum vørur, sum hava eitrandi evni í sær.

Um hetta uppskot kemur í gildi, vóna vit, at Føroyar kunnu verða ein fyrimynd fyri onnur lond, sum eru limir í ES.

**Á Ungdómstingi, 3. februar 2020**

Maria Beder Kristina Verlandsdóttir Hayfield Ida í Lon